# Búnaðarstevnan 2024

Varpið í Klaksvík 17. februar.
Tróndur G. Leivsson, stjóri, Búnaðarstovan

## “Landbúnaðarpolitikkur – viðurskifti sum eru frammi í tíðini og í okkara grannalondum viðvíkjandi framtíðar landbúnaðarpolitikki.”

Í Føroyum hava vit leingi havt tørv á einum nútímans og greiðum landbúnaðarpolitikki.

Landsstýrismaðurin í landbúnaðarmálum og hansara fyrisiting eru tey, ið hava ábyrgdina fyri hesum málsøki, og uppgávan hjá Búnaðarstovuni, sum fakmálastovni, er m.a. at veita teimum ymsa kunning, ráðgeving o.tíl. í teirra arbeiði.

Sum undirliggjandi stovnur hjá tí politisku fyrisitingini mugu vit tó til eina og hvørja tíð góðtaka tær treytir, sum politiska skipanin er vorðin samd um, óansæð um vit halda hesar vera nøktandi fyri geiran ella ikki.

Nú vit tíbetur kunnu vænta ein dagførdan og nútímans landbúnaðarpolitikk í næstum, kann tað hinvegin vera fakliga skilagott m.a. at varpa eitt sindur av ljósi á, hvørji landbúnaðarpolitisk viðurskifti, ið eru frammarlaga á dagsskránni altjóða og í okkara grannalondum.

Altjóða rembingarnar seinastu árini hava avgjørt vakt áhugan millum borgarar, felagsskapir, vinnulív og politisku skipanina í ymsu londunum kring okkum fyri, hvussu støðan er viðvíkjandi spurningum sum t.d. matvørutrygd, matvøruveitingartrygd og matvørusjálvbjargni o.s.fr.

Landbúnaður verður rikin til tess at framleiða matvørur, og eg fari í tí høpi at halda meg til hesar allýsingar:

- ✓ Matvørutrygd = Fødevaresikkerhed = Food safety.
- ✓ Matvøruveitingartrygd = Fødevareforsyningssikkerhed = Food security.
- ✓ Matvørusjálvbjargni = Selvforsyningsgrad = Food self-sufficiency.
- ✓ Matvørufulnaðarstig = Dækningsgrad = Food coverage.

Earl Butz ella "Rusty Butz” (landbúnaðarmálaráðharri í USA undir Richard Nixon og Gerald Ford í 1960/70 árunum) var maðurin, ið segðist leggja lunnarnar undir at niðurleggja familjulandbrúkini til fyrimuns fyri stóru ídnaðarlandbrúks fyritøkurnar og eina globalisering av matvørumarknaðunum.

Tað globaliserings- og liberaliseringsrák, sum fylgdi av hesum hugsjónum, og sum tók rættiligt dik á seg eftir, at “Kalda kríggið” var av, er nú komið í ein ávísan andróður; tí greitt er, at alsamt fleiri atfinningarsamar røddir seta spurnartekin við tað at lata t.d. matvørutrygd, matvøruveitingartrygd  og matvørusjálvbjargni v.fl. upp í hendurnar á marknaðarkreftunum einans.

Spurningar um t.d. viðbrekni innan matframleiðsluundirstøðukervið og matvøruundirstøðukervið, um umhvørvisárin og burðardygga matvøruframleiðslu (burðardygt bæði náttúru- og umhvørvisliga, sosialt og fíggjarliga), um tiltøk at linna undir veðurlagsbroytingarnar, um búseting og gagnnýtslu av staðbundnum tilfeingi, stuttfluttar matvørur, árstíðarbundnar matvørur o.s.fr., fáa alt størri rúmd í almenna kjakinum.

Lat meg fyrst taka eitt sokallað tyrluperspektiv um nøkur altjóða viðurskifti.

**FAO:**
Føroyar hava nú atlimaskap í ST-felagsskapinum fyri matvørur og landbúnað, FAO (The Food and Agriculture Organization).

Fremsta raðfesting FAOs er at leiða arbeiðið at basa hungri; har málsetningurin er skipanir at veita matvørutrygd og matvøruveitingartrygd til øll til tess at kunna liva eitt virkið og heilsusamt lív.

Í frágreiðingini “How to Feed the World in 2050” frá 2009 varpaði FAO ljós á, at Heiminum fer at tørva 70% meira av matvørum í 2050 til tess at nøkta tørvin.

Í nýggju frágreiðingini “The State of Food Security and Nutrition in the World 2023” staðfestir FAO m.a., at tað framvegis er langt eftir á mál til tess at náa Heimsmálinum, SDG 2 - *“Eingin hungur”*.

Hóast ávísar batar, hevur heimurin ikki megnað at vunnið inn aftur tey framstig á leiðini, sum fóru fyri skeyti orsakað av Covid-19 og nú seinnameiri eisini av krígsávum.

Knapt 30% av heimsins íbúgvum eru antin miðal ella hart rakt av vantandi matvørutrygd og matvøruveitingartrygd. Meira enn 40 % av heimsins íbúgvum hava ikki ráð til heilsusaman mat; har børnini eru meinast rakt, bæði av megurð ella av ovur vekt.

Økta býargerðin (urbaniseringin) í heiminum skundar undir hesa skeivu gongd, og býargerðin broytir eisini matvanarnar skeiva vegin mótvegis meira av ídnaðarviðgjørdum matvørum við høgum innihaldi av serliga sukri og feitti.

Uppgerðin hjá FAO vísir tó eisini, at sum heild er støðan í Evropa nógvar ferðir betri, enn fyri Heimin sum heild; tó er ovur vekt millum smábørn her omanfyri miðalvirðið í heiminum sum heild.

At støðan í Evropa er somikið góð kemst ivaleyst av fleiri orsøkum, m.a. av lutfalsliga ríkum samfeløgum.

Nógv talar tó fyri, at málrættaður landbúnaðr- og matvørupolitikkur í Evropa í fleiri áratíggju eigur sín stóra lut í bragdinum at basa hungurs- og megurðstrupuleikunum.

**ES:**
Síðani 1962 hevur Evropasamveldið havt ein felags landbúnaðarpolitikk “The common agricultural policy”, oftast umrøddur sum CAP.

CAP verður fíggjaður úr felags ES-kassanum og verður lýstir sum eitt samstarv millum landbúnaðargeiran og samfelagið og millum Evropa og tess bøndur.

CAP miðar nú á døgum eftir at:

- ✓ Stuðla bøndrum í Evropa og at menna framleidni (gransking og nýmenning) til tess at tryggja álítandi matvøruveiting og rímiligar matvøruprísir
- ✓ Tryggja evropeiskum bøndrum rímilig lívskor
- ✓ Linna um árinið av veðurlagsbroytingunum og stuðla burðardyggari umsiting av náttúrutilfeinginum
- ✓ Viðlíkahalda bygdarløgini og landslagið í Evropa
- ✓ Halda fíggjarliga haldførinum uppi í bygdarløgunum við at stimbra arbeiðsskapan í landbúnaðinum, landbúnaðarmatvøruvinnuni og í atknýttum vinnum.

ES skipaði í fjør summar fyri eini stórari ráðstevnu um landbúnaðargransking og -menning til tess at varpa ljós á gongdar leiðir framyvir, har høvuðsniðurstøðurnar m.a. vóru:

- *"Gransking og nýmenning"* eiga at hava sera høga raðfesting bæði við atliti til menning av ymsu tættunum í CAP og innan *"Farm to fork/Jord til bord"* strategiina fyri at styrkja landbúnaðargeiran.
- *"Grøna skiftið"* krevur íløguvilja frá myndugleikunum o.ø. fyri at eydnast og til tess at veita landbúnaðinum tær neyðugu loysnirnar og karmarnar.
- Tyrft má vera í gjónna millum vísindina og bøndurnar, soleiðis at framburðurin kemur øllum til góðar
- Staðbundnir, bottom-up, amboðskassar innan gransking og nýmenning, saman við góðum verkligum fyrimyndum, har bøndurnir verða tiknir við frá byrjan, er vegurin fram.
- Samanumtikið var tó eingin ivi um, at framtíðar landbúnaður og matvøruframleiðsla eru við eitt vegamót, har munandi størri dentur skal leggjast á burðardygd (umhvørvisliga-, sosiala- og fíggjarliga burðardygd) og á umhvørvið.

*"Farm to fork/Jord til bord"* strategiin er ein kjarnudepil í *"Grøna skiftinum"* hjá ES.

Málsetningurin er at umleggja landbúnaðar- og matvøruframleiðsluskipanirnar á ein meira burðardyggan bógv.
Nøkur av málunum eru m.a.:

- at linna um árinið av veðurlagsbroytingunum
- at bøta um umhvørvisárinini
- at økja um margfeldið
- at tryggja matvørutrygd, matvøruveitingartrygd og fólkaheilsu á burðardyggum grundarlagi
- at varðveita rímiligar matvøruprísir og rættvíst inntøkugrundarlag í geiranum
- at styrkja um kappingarførið og stuðla rættvísum handli.

Øll hesi góðorðini omanfyri sampakka ikki so væl við núverandi støðuna, har bøndur í fleiri evropeiskum londum mótmæla harðliga; so kanska "lekur millum teori og praksis" onkustaðni

**Nøkur fíggjarlig dømi úr ES-londum:**

- ✓ Í 2019 komu 56% av inntøkunum hjá **írskum** bøndrum frá CAP-studningi.

- ✓ Fyri tíðarskeiðið 2023-27 er framleiðslustuðulin úr CAP til írskar bøndur settur til uml. 9,8 milliardir EUR, bygdarmenningarstuðulin úr CAP til írska landbúnaðin til uml. 3,9 mill. EUR og landbúnaðarstuðulin úr írska statskassanum til uml. 2,3 mill. EUR.
- ✓ Árligi landbúnaðarstuðulin í **Írlandi** hetta tíðarskeiðið verður sostatt uml. 3,2 mill. EUR; og samsvarandi upphædd umroknað til fólkatalið í Føroyum hevði verið uml. **DKK 255 milliónir** um árið.
- ✓ Árligi landbúnaðarstuðulin í **Eysturríki** hetta tíðarskeiðið verður uml. 1,75 mill. EUR; og samsvarandi upphædd fyri fólkatalið í Føroyum hevði verið uml. **DKK 80 milliónir** um árið.
- ✓ Árligi landbúnaðarstuðulin í **Finnlandi íroknað Álandi** hetta tíðarskeiðið verður uml. 1,34 mill. EUR; og samsvarandi upphædd fyri fólkatalið í Føroyum hevði verið uml. **DKK 98 milliónir** um árið.

Hví havi eg valt at gera so nógv burturúr ES skipanunum?

- o Jú, tí teirra landbúnaðar matvørur eru beinleiðis í kapping við okkara føroysku vørur í teimum føroysku søluliðunum.
- o Tað er neyðugt, at vit í Føroyum kunna okkum um meginreglur og rák í umheiminum, sum vit eru í kapping við; um vit miða eftir at hava eina livandi og virkisfúsa landbúnaðarvinnu her á landi í framtíðini.
- o Uppáhaldið um at *“Vit eru føroyingar serstøk tjóð”* heldur tíverri ikki einsamalt í hesum føri.
- o Ja, vit kunnu ikki ein gong nýta føroyskt fiskamjøl í fóðrinum til føroysk húsdjór; tí ES í síni tíð setti forboð fyri at nýta fiskaprotein í fóðrinum til jóturdjór.

**Norðurlendskt samstarv:**
Norðurlendska samstarvið er í høvuðsheitum eitt ikki bindandi samstarv (í mun til t.d. ES-samstarvið).

Norðurlendskar fráboðanir bera tí hinvegin í høvuðsheitum boð um, hvørji stig, ið Norðurlond eru samd um at taka í felag.

Eitt felags ráðharraráð er fyri málsøkini fiskivinnu, aling, jarðarbrúk, matvøruvinnu og skógarbrúk, nevnt MR-FJLS.

Viðvíkjandi landbúnaði og matvøruframleiðslu hevur samstarvsætlanin fyri tíðarskeiðið 2021 – 2024 hjá MR-FJLS hesar raðfestingar:

- Samstarv um eina heildarliga fyrisiting av norðurlendskum tilfeingi
- Samstarv um ein burðardyggan lívbúskap sum drívmegi handan vøkstur og umskifti
- Samstarv um økt gyrði (resiliens) í geiranum og um linnandi tiltøk mótvegis avleiðingunum av veðurlagsbroytingum
- Samstarv um norðurlendskt ílegutilfeingi
- Samstarv um matvørutrygd, heilsusaman kost og matgleði.

Føgur orð vil onkur halda, men har er tó meira kjøt á beininum, t.d.:

- ✓ NNR-2023 - Nordiske Næringsstofanbefalinger - Norðurlendsk føðsluráð
- ✓ Ny Nordisk Mad
- ✓ NordGen (Nordisk Genressource Center)

- ✓ Samstarv av ymsum slagi um djóraheilsu og djórasjúkur, harundir minimering av antibiotika nýtslu í djórahaldinum
- ✓ Samstarv av ymsum slagi um matvørutrygd
- ✓ Samstarv av ymsum slagi um fiskivinnu
- ✓ Samstarv um fráboðan av plantusjúkum
- ✓ Eisini munandi stuðul til verkætlanir, kanningar, ráðstevnur o.tíl. av ymsum slagi
- ✓ Harímillum fíggjarligan stuðul til 11th Circumpolar Agricultural Conference, sum varð hildin í Norðurlandahúsinum síðsta heyst.

**Handilsavtalur:**
Her er serliga talan um tvær handilsavtalur, ið hava munandi árin á kappingarførið hjá føroyskum landbúnaði og føroyskum landbúnaðar matvørum á heimamarknaðinum.

- ✓ Sáttmálin frá 1997 millum Føroyar og Evropasamveldið, har ES hevur tollfría atgongd á føroyska marknaðinum fyri flest allar vørur.
    - o Einastu ítøkiligu avmarkingarnar fyri tollfríum innflutningi úr ES til Føroya eru fyri flestu mjólkarúrdráttir og fyri lambskjøt/geitakjøt og úrdráttir úr hesum.
    - o Fyri mjólkarúrdráttirnar er talan um ávikavist punktgjøld á 20% pluss kr. 0,60 → kr. 7, 40 pr. litur.
    - o Fyri seyðakjøt/geitakjøt og úrdráttir úr hesum er GATT tollur á 10%.
    - o Tó hevur ES frá 2023 at rokna eina tollfría kvotu á 80 tons av seyðakjøti/geitakjøti og úrdráttum úr hesum á føroyska marknaðinum.
    - o Hinvegin, hava Føroyar eina tollfría kvotu á 20 tons av seyðakjøti á ES-marknaðinum, men vit kunnu tíverri ikki gagnnýta hendan møguleika, tí vit ikki megna at liva upp til krøvini sbrt. Heilsufrøðiligu avtaluni við ES frá 2001.
- ✓ Sáttmálin millum Føroyar og Ísland (Hoyvíkssáttmálin) frá 2005 er í verki at meta sum ein fríhandilssáttmáli millum londini, tá tað snýr seg um føroyska marknaðin.
    - o Sáttmálin er tó samtyktur undir ymsum fortreytum í londunum báðum, og hetta førir við sær, at íslendskar ásetingar og avmarkingar á landbúnaðar- og matvøruøkinum forða føroyskum vørum at gagnnýta møguleikarnar á íslendska marknaðinum.
- ✓ Fríhandilssáttmálin við Bretland frá 2019 (eftir Brexit), er í fyrstu syftu ein framleingjan av sáttmálanum við ES (seinni broytingar kunnu tó saktans fáa munandi fylgjur fyri føroyskan landbúnað).
    - o UK hevur samsvarandi rættindi á føroyska marknaðinum, sum ES hevur, meðan Føroyar eiga kvotu á 3 tons av seyðakjøti á marknaðinum í UK, men sum vit heldur ikki kunnu gagnnýta í hesum føri.

Sum eitt áhugavert dømi um, hvussu matvørutrygd og matvøruveitingartrygd verða tikin í stórum álvara úti í stóru verð, kann verða nevnt, at borgarstjórin í London í mong áratíggju hevur havt eina serstaka ráðgevandi nevnd við 13 limum, “The London Food Board (LFB)”, at ráðgeva sær og býráðnum í slíkum málum, til tess at tryggja teimum knapt 9 milliónunum londonbúgvum síni matvørurættindi.

Mayor of London’s *“Food Strategy”* setur út í kortið, hvussu allir londonbúgvar skulu hava atgongd til heilsusamar, prísgóðar og burðardyggar matvørur, óansæð bakgrund og umstøður annars.

**Noreg:**

Landbúnaðarpolitikkurin fevnir um málsøkini “jarðarbrúk”, “urtagarðsbrúk”, “skógarbrúk” og “reinsdjórahald”, t.v.s. allar vinnugreinar, sum gagnnýta lendistilfeingið.

Jarðarbrúkspolitikkurin, hinvegin, fevnir um hesi lutamál: “jarðarbrúk”, “urtagarðsbrúk” og “reinsdjórahald”.

Verandi stevnumið fyri norskan landbúnaðar- og matvørupolitikk varð nágreinað í Stortingsmelding nr. 9 - 2011/12 undir heitinum “Velkommen til bords”, við fýra yvirskipaðum høvuðstættum, nevniliga:

- ✓ Matvørutrygd og matvøruveitingartrygd – at borgarin altíð hevur ítøkiliga eins og fíggjarliga atgongd til nóg mikið av dygdargóðum matvørum, og har málsetningurin er at økja innlendsku matvøruframleiðsluna og at styrkja um kappingarførið
- ✓ Landbúnaður í øllum landinum – eitt sterkt og kappingarført landbúnaðarumhvørvi kring alt landið, ið somuleiðis viðvirkar til at troyta landsins fjølbroyttu møguleikar, undir hesum eisini teir nýkomnu
- ✓ Økt virðisskapan – stórir møguleikar eru fyri virðisøking grundað á tilfeingið í jarðarbrúksgeiranum, eins og allari avleiddu virðisketuni, har geirin m.a. má taka neyðuga ábyrgd av komandi grøna skiftinum
- ✓ Burðardyggur landbúnaður - undir hesum minni útlát av veðurlagsgassum.

Hesar yvirskipaðu politisku ásetingar eru síðani m.a. grundarlag undir tí árliga “Jordbruksoppgjøret”; har norski staturin og landbúnaðarfelagsskapirnir gera semju um fíggjarligu fortreytirnar fyri landbúnaðin komandi árið.
OECD (The Organisation for Economic Co-operation and Development) staðfestir í 2021, at av hvørjari krónu, sum norski landbúnaðurin vinnur í inntøku, **stava 41% frá marknaðinum** (t.v.s. frá gjaldinum fyri vøruna), meðan **59 % stava frá almennum stuðulsskipanum** (t.v.s. frá umfordeilingspolitikkinum).

Árligi landbúnaðarstuðulin í **Noregi** í 2022 var 30,4 mill. NOK; og samsvarandi upphædd fyri fólkatalið í Føroyum hevði verið uml. **DKK 199 milliónir** um árið.

Í Noreg eru strangar ásetingar fyri, undir hvørjum fortreytum, tað kann vera loyvt at umskipa gott jarðarbrúkslendi til onnur endamál.
Í 2023 kom “Ny jordvernstrategi - nytt skjerpa mål for jordvern” har tað fyri alt landið verður miðað eftir, at í mesta lagi 200 ha av jarðarbrúkslendi kunnu umskipast árliga í tíðarskeiðnum fram til 2030.

Í Noreg er í útgangsstøðinum bannað at dyrka nýtt landbúnaðarlendi á mójørð (myr) orsakað av $CO_2$ útláti v.m., og undantak kann bert veitast í serstøkum føri.

Hesi viðurskifti verða í høvuðsheitum skipað sbrt. ásetingum í ávikavist *“Plan og bygningsloven”* og í *“Jordloven”*.

**Ísland:**
Íslandi samtykti í 2020 stevnumið fyri matvørupolitikk fram móti árinum 2030, men longu í 2023 komu nýggj og meira útgreinaði stevnumið fyri íslendskan matvørupolitikk, og á hesum sinni fram til 2040.

Samanfataði snúgva átøkini seg um:

- ✓ Økta virðisskapan, brúkara átøk og brúkaravernd, átøk um hugburðsrøkt og álit, umhvørvis- og veðurlagsátøk, átøk fyri betri fólkaheilsu, burðardygga matvøruframleiðslu og gagnnýtslu av tilfeinginum, búseting kring landið, gott undirstøðukervi og javnrættindi; matvørusjálvbjargni, matvøruveitingartrygd og matvørutrygd.

Í 2019 kom álitið: Íslendskur landbúnaður 2040 – ið er ein lýsing av framtíðarmøguleikum fyri íslendskan landbúnað árini fram til 2040.

Sum eina fylgju av hesum kom í 2023 Altingsmál til samtyktar *"um landbúnaðarstefnu til ársins 2040"*, ella *"Stevnumið fyri landbúnaðin fram til 2040"*.

Høvuðsevnini í politisku stevnumiðunum eru 10 í tali:

I. Matvøruveitingartrygd
II. Veðurlagsbroytingar
III. Lívfrøðiligt margfeldi
IV. Lendisgagnnýtsla og varðveiting av landbúnaðarlendi
V. Kringbúskapur
VI. Altjóða marknaðarspurningar
VII. Brúkaraviðurskifti
VIII. Nýskapan og tøkni
IX. Útbúgving, gransking og menning
X. Karmar fyri stuðulsskipanum til landbúnaðin.

Samlaðu útreiðslurnar á íslendsku ríkisfíggjarlógini til landbúnaðargeiran eru uml. DKK 2.940,- pr. íbúgva; og samsvarandi upphædd fyri fólkatalið í Føroyum hevði verið uml. **DKK 160 milliónir**.

Av hesum fara DKK 2.307,- pr. íbúgva beinleiðis til bøndurnar sum stuðul og tænastur; og samsvarandi upphædd fyri fólkatalið í Føroyum hevði verið uml. **DKK 125 milliónir**.

Harumframt koma galdandi verjutollskipanir, ið eru á innfluttum landbúnaðarmatvørum, og sum eru við til at halda marknaðarprísinum uppi.

Afturfyri hesa peningaligu umfordeiling veitir landbúnaðargeirin og landbúnaðarmatvøruvinnan í Íslandi, saman við fiskivinnuni og alivinnuni, íslendska samfelagnum eitt sjálvsveitingarstig av matvørum á omanfyri 50% (har Noreg eisini er áleið).

Vinnuligi landbúnaðarstuðulin í Føroyum í 2024 er knapt **19 milliónir krónur**. Haraftrat koma ymiskir verkætlanarstuðlar v.m. á íalt kr. knapt 3 milliónir krónur.

- Vit síggja, at her eru fleiri felagsnevnarar allan vegin niður gjøgnum luftløgini, heilt frá FAO, ES londunum og síðani niður á okkara norðurlendsku grannalond, sum t.d. Noreg og Ísland.

- Vit síggja somuleiðis, at virkin landbúnaður og landbúnaðarmatvøruvinna eru fevnd av munandi búskaparligum umskipanum; óansæð hvørja landastødd og landafrøði, ið talan er um.
- Vilja vit hava ein virknan landbúnað og eina munagóða landbúnaðarmatvøruframleiðslu í Føroyum, og soleiðis hava eitt matvørusjálvbjargni á nøktandi støði, ber ikki til at síggja burtur frá hesum veruleika, og bert “stinga høvdið í sandin”.
- Tað er altso ein orsøk, og ikki minst ein fíggjarlig orsøk, til, at lítil og eingin landbúnaðarvinna og landbúnaðarmatvøruvinna er í Føroyum.

Takk fyri.